# Harry málar føroyska summarljósið

FRAMSÝNING
*Marjun Dalsgaard*

Evnið er sermerktað føroyska náttúruljósið, nú 27 ára gamli Harry Knudsen úr Runavík fer at sýna málningar fram í Smiðjuni í Lítluvík. Dyrnar lata upp hósdagin 10. juli klokkan 15 og framsýningin heldur fram til 16. juli.

Hetta er aðru ferð, at Harry Knudsen sýnur sínar málningar fram í Smiðjuni. Fyrstu ferð var fyri tveimum árum síðan, og síðan hevur hann eisini havt eina framsýning í Danmark í hølunum hjá fyritøkuni Crawford.

Harry Knudsen býr í Danmark, og tað hevur stóra ávirkan á hansara listarliga arbeiði.

- Tað er serliga ljósið, sum hugtekur meg, tá eg komi heim til Føroya. Niðri í Danmark er alt ljóst ella myrkt. Her eru so nógvir ymiskir litir – líkamikið hvar tú vendir tær, fært tú nýggjar upplivingar – serliga um summarið, tá dagur rínur saman við nátt, sigur hann.

Tá hann málar, lýsir Harry Knudsen hettar við at nýta sterkar liti. Hann málar náttúrmotivir í skýming og lýsing.



*- Tað er serliga ljósið, sum hugtekur meg, tá eg komi heim til Føroya. Her eru so nógvir ymiskir litir – líkamikið hvar tú vendir tær, fært tú nýggjar upplivingar, sigur Harry Knudsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Harry Knudsen hevur góðar vónur um framsýningina.

- Eg havi puslað leingi við málningunum og verið rímiliga kritiskur, sigur hann og leggur aftrat:

- Eg haldi, at hon er nokkso egin. Tað merkir ikki, at eg ikki havi fingið íblástur frá øðrum listamálarum, ið mála føroysku náttúruna – tvørturímóti, so eri eg altíð so fullur av íblástri hvørja ferð, eg havi sæð málningar hjá eitt nú Kára Svensson ella Zacharias Heinesen, at tað slepst ikki undan, at okkurt liggur eftir, tá eg arbeiði við mínum egnu málningum, siger hann.

Sín serliga stíl metur hann vera, at hann málar abstrakt, men tó altíð so, at motivið sæst.

- Gentan hjá mær sær altíð, hvat motivið er, men vinirnir kunnu gott halda, at ein málningur ikki vísir nakað ávíst, fyrr enn eg vísi teimum á motivið - tað liggur á markinum fyri at vera heilt abstrakt – tað er sera stuttligt at arbeiða á tann hátt, sigur hann.

Eftir Ólavsøku letur Harry Knudsen eina framsýning upp í Runavík í Piddasa Handli. Hendan sýningin varar frá 7. til 13. august.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn ella mjørki. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin andøvsgul av útsynningi, mánadagin minni vindur av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 13 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 17 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | 12 |
| Halifax | 19 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 21 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga norðureftir og gevur eitt skifti nakað av vindi av útnyrðingi. Leygardagin kemur ein hátrýstryggur inn yvir Føroyar av vestri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/07 kl. $06^{00}$– 09/07 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 08/07 kl. $06^{00}$–09/07 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 8,8 mm

ÚF
**Morgunlestrar**
**14.–19. juli**

***Henry Debes Joensen á Argjum lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 14. juli:**
nr. 33 Ævinnar faðir, við góðsku tú valdar

**Týsdagin 15. juli:**
nr. 138 Mildi Jesus, tú sum segði
nr. 355 Guð algóði, signa nú

**Mikudagin 16. juli:**
nr. 295 Mín vón og øll mín gleði

**Hósdagin 17. juli:**
nr. 360 Takk, Jesus, fyri dópin mín
nr. 358 Guð faðir hann veri nú verndari tín

**Fríggjadagin 18. juli:**
nr. 599 Rís í Jesu navni nú

**Leygardagin 19. juli:**
nr. 589 Vár Guð, sum lívgar fjøll og fjørð

## VESTFALLSKYRRINDI

4. juli: Jørðin longst frá sólini
7. juli: Fyrra kvarter
10. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 10. juli | 04.05 | 16.30 | 03.05 | 15.30 | 03.20 | 15.45 | 06.05 | 18.30 | 07.05 | 19.30 | 02.20 | 14.45 | 01.20 | 13.45 | 04.20 | 16.45 | 05.20 | 17.45 | 03.50 | 16.15 | 05.05 | 17.30 |
| 11. juli | 04.56 | 17.26 | 03.56 | 16.26 | 04.11 | 16.41 | 06.56 | 19.26 | 07.56 | 20.26 | 03.11 | 15.41 | 02.11 | 14.41 | 05.11 | 17.41 | 06.11 | 18.41 | 04.41 | 17.11 | 05.56 | 18.26 |
| 12. juli | 05.56 | 18.30 | 04.56 | 17.30 | 05.11 | 17.45 | 07.56 | 20.30 | 08.56 | 21.30 | 04.11 | 16.45 | 03.11 | 15.45 | 06.11 | 18.45 | 07.11 | 19.45 | 05.41 | 18.15 | 06.56 | 19.30 |
| 13. juli | 07.04 | 19.28 | 06.04 | 18.28 | 06.19 | 18.43 | 09.04 | 21.28 | 10.04 | 22.28 | 05.19 | 17.43 | 04.19 | 16.43 | 07.19 | 19.43 | 08.19 | 20.43 | 06.49 | 19.13 | 08.04 | 20.28 |
| 14. juli | 07.52 | 20.20 | 06.52 | 19.20 | 07.07 | 19.35 | 09.52 | 22.20 | 10.52 | 23.20 | 06.07 | 18.35 | 05.07 | 17.35 | 08.07 | 20.35 | 09.07 | 21.35 | 07.37 | 20.05 | 08.52 | 21.20 |

5 707265 100043 >